Egyptalandsferðin verður nú víðkað til Reyða havið

Tað eru enn nøkur pláss á ferðini til Egyptalands tann 29. juni — við einum føroyingi — Karl Nolsøe sum ferðaleiðara.

Ferðin er nú víðkað til eisini at fevna um ein túr til Reyðahavið. Tey ferðandi skulu ikki gjalda meirkostnað fyri teir báðar dagarnar við Reyða-havið.

Hesar eykaútreiðslur rindar Stjernegaard Rejsebureau í Keypmannahavn sum ein eyka gestus fyri føroyingar.

Tey, sum enn ikki hava tikið avgerðina, um tey skulu taka av tilboðnum at fara til EGYPTALANDS við einum føroyskum ferðaleiðara, hava so enn møguleikan at vera við.

Ringið til:
Sosialurin tlf. 11820 ella
Karl Nolsøe tlf. 01 491339

Sjónvarpsandlitið

Fram til ólavsøku fara vit á hesum plássinum í hvørjum Sosiali at prenta eitt kent andlit í hesum sjónvarpsglugganum, sum tit skulu gita navnið á.

Tit skulu goyma lepan við navninum og senda okkum øll nøvnini umleið eina viku fyri ólavsøku. Vit skulu siga nærri frá hesum tá.

Hava tit øll nøvnini, luttaka tit í lutakastinum um eina videomaskinu frá LM-handlinum. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í ólavsøkublaðnum.

Nordmende frá LM

Videomaskinan er av merkinum NORDMENDE.

Nr. 11



Tvørámaður. Fyrrverandi tingmaður og bygdarráðsformaður. Sera íðin og virkin ítróttarmaður.

Loysn nr. 11

Klippið út og goymið til kappingin er liðug

Viten om cellenes «personlighet» gir nøkkelen:

Mavesåroperasjoner blir sjeldnere

PETER BECK

Medisiner som påvirker cellenes organisme kan om få år erstatte kirurgens kniv ved mavesåroperasjoner. Dette vil spesielt komme de pasienter til gode som har en ekstremt stôr utskillelse av mavesyre, hvor eneste utvei idag vil være kirurgisk inngrep for å kutte nerven som dirigerer syreutskillelsen i magesekken. Lege Steinar Aase ved Aker sykehus har gjennom sin doktoravhandling og studier av cellenes indre spesialisering, bidratt med en viktig brikke i puslespillet.

Riktignok finnes det meget gode medisiner idag for å påvirke de syredannende celler til å danne mindre syre. I mange tilfeller kan derfor mavesåroperasjoner unngås. Men disse medisinene påvirker bare cellenes ytre, og dette er ikke tilstrekkelig i de tilfeller hvor utskillelsen av magesyre er spesielt stor. Og hittil har man ikke hatt viten nok om cellenes indre oppbygging og ikke minst funksjon til å sette bremsene på der. For viden om cellenes «indre liv» er nettopp nøkkelen når medisinen utformes.

— Skolebarn vet at en celle består av cellekjerne med cytoplasma og et «skall» av membran rundt. Mine studier til den medisinske doktorgraden har imidlertid konsentrert seg om cytoplasmaen: Det viser seg at dette er noe langt mer enn en væske som cellekjernen flyter rundt i. Cellene har faktisk noe som tilsvarer lunger, nyrer og et slags tarmsystem. Betegnende nok kaller vi cellenes organer for organeller. Og cellene er høyst forskjellige i sin indre organisasjon — her er celledeler som tar seg av f.eks. energiproduksjon, fordøyelse, bevegelse osv., sier Aase.

Det faktum at cellene har sitt eget, uavhengige arvestoff, forsterker teorien om at det en gang i urtiden ble inngått et fornuftsekteskap mellom en selvstendig bakterie og deler av det som idag er de menneskelige celler.

Anslagsvis fem prosent av den norske befolkning stifter en eller annen gang bekjentskap med sår på mavesekk eller tolvfingertarm. Og det sier seg selv at selv om operasjonen for å kutte den syrestimulerende nerven er rutine, så er det tross alt et kirurgisk inngrep på et par timer med de ubehageligheter som automatisk kan følge. Aase understreker at hans bidrag med cellestudier er en ganske liten brikke, et nyttig verktøy for dem som vil vite hvordan medisiner påvirker cellenes indre. Ikke minst er det viktig å vite hvordan cellene hos friske mennesker fungerer.

Av en eller annen grunn synes sår på tolvfingertarmen å gå tilbake i befolkningen. Dette har antagelig endel med fornuftigere matvaner å gjøre — og ikke minst er det en klar sammenheng mellom røyking (og alkohol) og sår på tolvfingertarmen. Ennå er det flere menn enn kvinner som har sår på tolvfingertarmen, men i takt med «likestillingen», ikke minst røyking, er det lenge siden mennene var i betydelig overvekt.

Selv om Aases arbeid har konsentrert seg om hvordan cellene reagerer på en mavesåroperasjon hvor den syredannende nerven kuttes, er det klart at hans resultater også er et viktig verktøy for dem som skal «skredderas» medisiner.

Henda greinin stóð at lesa í norska blaðnum »Aftenposten« nú um dagarnar og snýr seg um gransking, sum norðmenn takast við í samband við magasár.

Framhald av síðu 3

at verða lagdur undir skurð ella at taka tablettir restina av livinum ella í sera langa tíð.

Tosið við sjúklingin

— Hvat halda tygum er tann besta viðgerðin?

— Eg vil mæla øllum læknum til at tosa við sjúklingin um, hvat hann ynskir. Tað er jú sjúklingurin tað snýr seg um og hansara magasár. Tí haldi eg, at vit læknar sera gjølla eiga at siga sjúklinginum, hvat honum bagir og hvørjir viðgerðarhættir eru at velja imillum. So má sjúklingurin vera við til at avgera, hvørja viðgerð hann skal hava.

Uppá fyrispurning um tað eru nógv menniskju í dag sum hava og fáa magasár sigur Amdrup, at magasár er ein sera vanlig sjúka.

— Millum 5 og 10% av øllum menniskjum í heiminum hava ella fáa magasár, men sjálvandi er tað sera ymiskt, hvussu álvarsligt magasárið er.

— Magasár er ein sera undarlig sjúka. Meðan nógvar aðrar sjúkur finnast í størri mun í einum geografiskt avmarkaðum øki, so finst magasár alla staðni í eins stóran ella lítlan mun, og hevur einki samband við serstøk viðurskifti.

Kenna ikki orsøkina

— Hvor er so orsøkin til magasár?

— Tað vita vit framvegis ikki. Vit kunnu bert siga, at fólk við ávisum blóðtypum fáa magasár oftari enn onnur, men vit vita ómetaliga lítið um orsøkina til magasár, hóast hetta hevur verið kannað nógv.

— Hevur magasár so einki at gera við tann mat tú etur?

— Tað hevur einki við matin at gera.

— Tað hevur verið sagt, at sera sterkur og krydraður matur elvir til magasár, er tað so skeivt?

— Ja, tað er skeivt. Ein kann sjálvandi irritera sjálvt vælindið og møguliga fáa krabbamein í vælindinum um tú etur sterkan mat í longri tíð, men tað hevur so einki við magasár at gera.

— Hvussu tá við brennivíni og øðrum sterkum drykkjum?

— Tað sama er galdandi. Heldur ikki tað elvir beinleiðis til magasár.

Amdrup sigur tó, at hevur ein magasár, so skal ein nokk vera eitt sindur varin við ikki at drekka ov nógv av sterkum brennivíni, og ein kann eisini siga, at eitt magasár lekist seinri, um tú roykir.

Sjúkueyðkenni!

— Hvørji eru sjúkueyðkennini til eitt byrjandi magasár?

— Tú hevur ilt í maganum. Henda brennandi og sviðandi pínan fer so eisini út í ryggin. Tað vísir seg eisini, at pínan er ymisk frá árstíð til árstíð. Mest pína er um várið og heystið. Tað hjálpir oftani at drekka mjólk, men tað gongur bert stutt tíð, so er pínan har aftur.

— Eru tað nógv fólk, sum ganga við einum magasári, uttan at tey vita av tí?

— Tað trúgvi eg neyvan. Men ein kann siga, at tað eru nógv fólk, sum hava ilt í maganum, uttan at hava magasár.

— Eru tað nógv fók sum í dag doyggja av magasári?

— Tað eru tað framvegis. Serstakliga um sárið fer uppaftur, og tað fer at bløða nógv, ti eru tað serliga tey eldru, sum eru í sera stórum vanda.

— Nú eru tygum serfrøðingur á hesum umráðinum, men er tað ikki eitt sindur hugstoytt ikki at vita, hvørjar orsøkirnar eru til, at fáa fáa magasár?

— Tað er tað sjálvsagt. Men annars kann ein siga, at viðgerðin av sjúklingum við magasári er vorðin so nógv nógv betri. Vit hava betri eftirlit við sjúkuni nú. Men sjálvandi er tað mítt største ynski at finna fram til, hví fólk fáa magasár.

Orsøk og fyribyrging

— Er nóg nógv gjørt fyri at finna fram til orsøkina?

— Tað eru nógvar kanningar gjørdar uttan nakað endaligt úrslit. Men tað er oftani nógv torførari at finna fram til orsøkina til sjúkur, enn tað er at finna fram til viðgerð móti sjúkum

— T.v.s. at læknar í dag eru ikki farin fyri at gera nakað fyribyrgjandi arbeiði móti magasári?

— Nei, tað hava vit ongar møguleikar fyri í dag.

— Men er tað ikki tann vegin ein eigur at ganga?

— Jú, so avgjørt, men ein kann ikki fyribyrgja uttan at kenna orsøkina, og hana kenna vit ikki í dag, tianverri. Eg fái tí ikki givið fólki góð ráð um, hvussu tey skulu liva og fyrihalda sær fyri ikki at fáa magasár.

— Nú verður oftani sagt, at stjórar og leiðarar, ið hava »stressandi« arbeiði, eru meira útsettir fyri at fáa magasár enn onnur. Er heldur ikki hald í tí?

— Hatta hevur oftani verið framført, men tað hevur so einki við veruleikan at gera.

Nógv gransking

Tað verða brúktir nógvir pengar til at granska í nýggjum sløgum av heilivági til eitt nú magasársjúklingar og eru fyritøkur eisini komnar fram til nógv góð úrslit.

Tann multinationala fyritøkan »Smith, Klein & French« hevur m.a. gjørt fleiri ymsar tablettir til sjúklingar við magasári, ein teirra er Tagamet.

Tað var henda fyritøkan, sum tók stig til at fáa Amdrup til Føroya at halda fyrilestur um viðgerðarmøguleikarnar viðvíkjandi magasári.

jan